## Lýsa eftir kommunulæknum

Heilsumálaráðið ger nú aftur eina roynd at fáa kommunulæknar.

Lýsing er sent føroysku bløðunum og danska læknatíðarritinum.

Um alt landið er trot á kommunulæknum, og tey størvini verða sum er røkt av avloysarum, sum koma higar í styttri tíðarskeið.

Leysu størvini eru í Suðurstreymar-, Suðuroyar Norðara-, Runavíkar-, Skála-, Fuglafjarðar- pg Norðoya læknadømi.

Umsóknarfreistin er 16. august.

Í ólavsøkurøðuni nevndi løgmaður, at bara 18 av 32 eru sett, og at av teimum 18 er helvtin yvir 60 ár.

## Breyt skøvningarnar

Beint fyri klokkan 22 ólavsøkukvøld fór ein bilur út av vegnum oman fyri fjósið í Havnardali.

Í bilinum vóru ein kvinna og ein maður.

Ein smádrongurin boðaði politinum frá, at hann sá royk, og at hann hoyrdi onkran rópa um hjálp.

Sløkkiliðið, politið og sjúkrabilur fóru á staðið, og bæði fólkini vórðu flutt á Landssjúkrahúsið. Hann við brotnum skøvningum, og hon skelkað.

Orsøkin til óhappið er ókend. Bilurin er farin runt og gjørdist vrak.



# Prestur giftur

**BRÚDLEYP** Sunnudagin vígdi Jógvan Fríðriksson, bispur, Emil Olsen, sóknarprest Og vinkonu hansara gjøgnum nógv ár, Jasminu Pavlovic

Randi Jacobsen

Uttan at rópa hart um tað, varð Emil Olsen, sóknarprestur í Eiðis prestagjaldi sunnudagin vígdur við eini kvinnu, sum hevur verið vinkona hansara í eini 20 ár.

Jógvan Fríðriksson vígdi parið í Dómkirkjuni.

Nýggja prestakonan eitur Jasmina Pavlovic og er ættað úr Serbia. Mamman er serbi, og pápin italskur.

Jasmina Pavlovic hevur í fleiri ár búð í Danmark og hevur arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Danmark. Nú fara tey at søkja um, at hon skal fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum, sigur Emil Olsen.

Hann sigur, at tey komu at kennast í Danmark. Hesi árini, tey hava kenst, hava tey tvær ferðir verið í Serbia, og tað var eftir eina avbera góða vitjan í fjør í Serbia, at tey fingu hug at kasta saman.


GIFTUR

*Jógvan Fríðriksson vígdi Emil Olsen og Jasminu Pavlovic í Dómkirkjuni*

Privatar myndir